[ Mai ]

# »Pantseta frælsið í donskum varmapútum«




**Torbjørn Jacobsen sló til høgru og vinstru, tá ið hann helt røðu á Vaglinum í Havn 1. mai. Hann spurdi, um vælferðarsamfelagið er við at sigra seg í hel, nú vaknsir menn sleingjast í sofum, drekka skálir fyri Morinho og Abramovich og ivast í, um Wayne Rooney kanska hevur vitjað á bordelli**

1. mai helt løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen røðu á Vaglinum í Havn. Altjóða arbeiðaradagin var hann so bersøgin og ágangandi sum sjáldan. Hann sló til høgru og vinstru í føroyskum politikki, leitaði út í heim eftir frændum og fíggindum og dró alt heimaftur til eina blanding av revsing og ruðuleika.

Her er nakað av tí, sum hann segði hendan dagin:

– Fakfeløgini hava havt týðandi og avgerandi leiklut í framtøkuni í føroyska samfelagnum. Tað svitast ikki. Men samstundis er tað púra rætt, sum formaður Havnar Arbeiðsmannafelags segði fyri ári síðani, at tað kennist órógvandi so lítil áhugi, sum nú tykist vera fyri arbeiðaradegnum. Hesi seinastu árini nøkur fá tandur, ið hava hokið framvið gamla Kommunuskúlanum og ditto Bókhandlinum, í royndini at frætta hvatið nakrir yvirgøddir breyðpolitikarar hava at siga teimum, sum knossa fyri síni úrkomu, tíma fyri tíma, á flakavirkjum, í egningarskúrum, í bilsmiðjum, á kajuni, í krambúðum og so fordont. Her er ongin glóð, onki engasjemang, ongin uppreistur, ongin skoðan inn í framtíðina. Byrjandi moydnaroykur og turrur deymur av status quo smellir í næsagluggarnar.

– Hetta stendur í skærari andsøgn til myndirnar á skígjanum hjá teimum, sum eru á mínum aldri. Sterku haldini og orðini á Vaglinum hendan dagin og úti á Skansanum, á Doktaragrund og úti í Læraraskúlahøllini, harið alt slag av sosialistum hittust, reyða kórið sang og stríðsfúsir ungdómar slerdu eitt slag fyri eini solidariskari framtíð. Nú er alt individualiserað. Amerikaniserað. Globaliserað. Øll hava nógmikið í sær sjálvum. Vælferðarsamfelagið doyvir. Vaksnir menn sleingjast í sofum, eta poppkorn og zappa seg ígjøgnum tíggjutals sjónvarpskanalir. Drekka skálir fyri Morinho og Abramovich. Illneitast um okkurt slatriblað, sum rør framundir, at Ferguson er í holt við at selja van Nistelroy og um nakað man vera í tíðindunum um allar bordelvitjaninar hjá Wayne Rooney. Er vælferðarsamfelagið ávegis at sigra seg sjálvt í hel. Í fer við at gerast eitt tómt fíggjarligt hylki ? við ongum substansi? Ongari kós? Ongum hugsjónum ella visiónum, sum kunna flyta menniskja inn í eina spennandi og innihaldsríka framtíð?

## Valdskabalan

Tobjørn Jacobsen helt eisini, at tað var eitt paradoks, at harðastu mótstøðumenn í svart/hvíta heiminum fyri 30 árum síðani nú samstarva í landsins leiðslu.

– Kammerátar. Kenda tiltalusniðið hjá øllum heimsins kommunistum rungaði millum húsaveggirnar á Vaglinum fyri tríati árum síðani. Ungur framamaður royndi í svart/hvíta heiminum at tosa fyri heimsfatanini hjá politbýronum í Kreml.

– Nú situr hann á ovastu rók í sosialdemokratiskum flokki, ið letur sær lynda, at Pinochet-fjepparin Óli Breckmann er sjefdomptørur í hini mest konservativu og asosialu heimastýrisstjórn nakrantíð. Kanska hevði ein marxistiskur ástøðingur rætt, táið hann tvíhelt um, at sosialdemokratisku flokkarnir ikki kundu brúkast í kollveltingarliga stríðnum hjá teimum fæleysu, men heldur eru valmaskinur, skaptar til parlamentsval og hitt parlamentariska stríðið. Og haðani er stutt út á rekamið, íður og vaggandi gjálv. Tað ræður bara um at fløkja seg upp í onkra valdskabalu. Politiski substansurin er óviðkomandi. Bæði táið ræður um loysing ella samband – vinstra ella høgra. Gallíónsfigurar, sum svíkja arbeiðarafjøldina og pantseta føroyska frælsið í donskum varmapútum. Politiskt korrumperaðir korridor- covboyarar, ið dyrka sítt egna vald meira enn natiónalu áhugamálini og lívslunnindini hjá fólkinum, sum valdi teir, segði Torbjørn Jacobsen.

» Í Føroyum verður ófaklært arbeiði stuðlað við skattalætta til sjómenn - vit áttu heldur at eggja til at skapa nýggjar vinnur - vit mugu stuðla íbirtarum, fólkum, sum vísa áræði. «

*- Heini Zachariasen, stjóri í Bullguard*

» Advokatar hava nærum fingið einarætt uppá sannleikan í føroyskum politikki. Ja, teir kunnu næstan samanberast við orakul og heksadoktarar. Men tað ber altíð til at bíleggja sær politisk argument frá einum advokati, og øll fáa tað, sum tey hava brúk fyri, tí nógvir teirra eru til sølu til hægstbjóðandi. «

*- Sjúrður Skaale, stjórnmálafrøðingur*

**VB vinnur føroyameistaraheitið í kvinnuhondbólti, og tær fáa gullmerkini handað á seinasta leikdegnum fyrsta dagin í mai.**

## Hondgranat á diskotek

Eitt bumbulið hjá løgregluni í Keypmannahavn kom á føroyska diskotekið í Keypmannahavn, Jaques, tá ið ein fráboðan kom um, at onkur hevði spælt við eina hondgranat á diskotekinum. Ein gestur segði starvsfólkinum frá, at tríggir menn spældu við okkurt sum líktist eini hondgranat. Durðarvørðarnir kannaðu málið, og sóu at granatin var ordilig. Teir fylgdu so monnunum út, og burturvístu teir. Samstundis boðaði starvsfólkið løgregluni frá. Løgreglan kom á staðið, og mennirnir vórðu handtiknir ein hálvan tíma seinni.

## Sangir ov avbjóðandi

Foreldur at børnum, sum skulu taka lut Nósa Barnaprixnum, harmast um, at eingir føroyskir barnasangir, sum børnini kenna, eru millum løgini, veljast kann ímillum. Har eru mest bara enskir kærleikssangir.

Summir við beinleiðis sexuellum heitum og undirtónum, siga foreldur, sum Sosialurin hevur tosað við. Við at hyggja gjøgnum listan við uppskotum til sangir, síggjast heiti sum »Sexed up«, »Sweet transvestite« og »Jeg vil i seng med de fleste«, vísa hesi foreldrini á.

– Tað er ov dýrt at brúka føroyskar sangir, men vit fara ongantíð at loyva børnunum at syngja ósømiligar sangir, siga fyrireikararnir av Barnaprixnum.

## Endaleysar bøtur

– Talið á bótum, vit kunnu skriva um dagin, er bara ein spurningur um, hvussu nógv fólk, vit hava.

Tað verður sagt av politistøðini í Klaksvík. Løgreglan í Klaksvík hevur gjørt eitt ordans hál nú ein dagin, hon kannaði ferðsluna. Uppá góðar fýra tímar høvdu teir skrivað 102 bøtur, og tað var kanska met hjá løgregluni í Føroyum.

– Tað er heilt vónleyst at fáa fólk at brúka trygdarbelti og høvdu vit nokk av fólki, kundu vit sum onki skriva 1000 bøtur um dagin, sigur politistur á vakt á politistøðini í Klaksvík.